## Enn ein stórsigur til Danmark



Tað sær út til at gerast trupult at steðga danska landsliðnum við EM, har teir higartil hava víst stóra styrki. Í fyrradagin hølvaðu teir Kroatia av við tíggju málum, og í gjárkvøldið fekk Pólland sama stórtap, tá ið Danmark vann 36-26, eftir at hálvleiksstøðan var 17-13 til Danmark. Aftur hesa ferð spældi málverjin, Kasper Hvidt, ein stórdyst. Lasse Boesen gjørdist danskur toppskútti við átta málum, meðan hálvi føroyingurin, Hans Lindberg, skoraði fýra mál. Tá Noreg tapti 29-33 fyri Slovenia, er Danmark nú á fyrsta plássi í sínum bólki í miðumfarinum. Ein dystur er eftir, og tað skal eitt størri undur til, áðrenn Danmark rýkur úr. Um tað skal lata seg gera, skal Slovenia vinna við heili 33 málum á Danmark í kvøld.

## Aftur hálvfinalur í kvøld

Bæði í Hoyvík og í Runavík verður talan um hálvfinalur í steypakappingini í hondbólti í kvøld. Í Hoyvík tekur mansliðið hjá H71 móti Kyndli í einum dysti, sum líkist eini sera intensari grannauppgerð millum tvey lið, ið einvíst stíla eftir steypafinaluni. Bæði Tjaldur og Kyndil hava helst tikið fleiri á bóli við at vinna sær vegin fram til hálvfinaluna, og í kvøld verður fyrra slagið teirra millum um, hvat av liðunum skal koma í finaluna, har Stjørnan helst verður mótstøðuliðið.

# Hava ikki slept høllini

**Hóast FSF púrasta tykist hava slept ætlanunum um eina fótbóltshøll, so hava tey á Toftum framvegis vónina um, at Svangaskarð skal verða karmur um slíka høll**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Sum skilst, so kann ein fótbóltshøll byggjast á verandi stadion við Svangaskarð fyri umleið 20 milliónir*

Upprunaliga var Svangaskarð partur av kapprenningini við Skálabotn um rættin til tær 12 UEFA-milliónirnar, sum FSF hevði ætlað til eina fótbóltshøll. Men síðani valið fall á høllina í Skálabotni, hevur verið rættiliga friðarligt við tosinum um eina høll á Svangaskarði.

### Ballón á Svangaskarði

Men hetta merkir tó ikki, at ætlanin um eina høll á Toftum er slept. Heldur ikki, hóast FSF-útmeldingin nú sigur, at tankarnir um menning av føroyskum fótbólti verða vendir aðrar vegir enn móti eini fótbóltshøll.

- Vit hava í eina tíð havt varhugan av, at ætlaða høllin í Skálabotni kanska varð av ongum. So vit hava eisini skavað nakað í ætlanini, sum á sinni varð send inn av Toftum, sigur Símun Johannesen, sum er borgarstjóri á Toftum.

- Heilt ítøkiliga hava vit ikki nakra lidna ætlan, sum vit nú kunnu leggja fram, men vit hava kannað nøkur viðurskifti. Og her tykist mest upplagda loysnin vera ein sonevnd ballón-høll. Tað vil siga ein høll, har ein luftbobla at kalla verður løgd yvir Svangaskarð.

- Tá vit av fyrstan tíð hoyrdu um hendan møguleikan, hildu vit, at hetta kanska ljóðaði dekan ov smart. Men vit hava kannað hesar loysnirnar, og tað er helst besti møguleikin. Fram um ætlanina at gera ein nýggja høll, so hevur hetta tann fyrimunin, at vit longu hava allar fasilitetir við vøllin á Svangaskarði. Tí snýr tað seg um at inniloka vøllin og møguliga húsið við. Og síðani at skifta grasið út við graslíkið.

- Vit vita, at bæði í Íslandi og í Noreg eru slíkar hallir ávegis. Framleiðarin stendur inni fyri, at høllin tolir í minsta lagi 70 m/s í vindmegi, so vit meta okkum heilt avgjørt hava eitt sera gott alternativ til nú sleptu ætlanini í Skálabotni, sigur borgarstjórin.

Borgarstjórin sigur ikki nakað um kostnaðin. Men sum Sosialurin hevur skilt, so liggur kostnaðarmetingin av eini høll á Svangaskarði um tær 20 milliónirnar. FSF hevur ikki sagt alment, hvørjum tølum roknað varð við í Skálabotni. Men í fjør vórðu tøl sum 60 milliónir nevnd, og við teimum príshækkingum, sum síðani hava verið, er als ikki veruleikafjart at hugsa sær, at endaligi kostnaðurin vildi verið onkra staðni millum 60 og 80 milliónir.

### Hava sent áminning

Formliga hevur Svangaskarð ikki verið partur av nakrari hallarætlan, síðani avgerðin á sinni fall á ætlanina í Skálabotni. Og hóast toftamenn ikki hava nakra lidna ætlan her og nú, so hava teir mint FSF á teirra møguleika.

- Tað er jú nakað av tíð síðani, at tað vóru tekin um trupulleikar við høllini í Skálabotni. Og at tann ætlanin soleiðis kundi detta niðurfyri. Vit gjørdu tí av at senda FSF eitt skriv, har vit mintu á, at vit eisini høvdu latið umsókn inn. Okkara fatan var og er, at gjørdist støðan tann, at Skálabotnur ikki bleiv veruleiki, so eiga vit at fáa møguleikan at leggja hesa ætlanina fram.

Men FSF sigur, at tað nú skal arbeiðast skjótt. Hvussu skjótt kunnu tit hava eitt liðugt projekt um nýggja fótbóltshøll klárt?

- Enn hava vit ikki gjørt eina ítøkiliga ætlan. Men nú hin ætlanin er slept, seta vit sjálvandi ferð á. Okkara vón er í øllum førum, at vit fáa tann møguleikan, sum vit halda okkum hava rætt til. Og vit halda eisini, at tað fyri føroyskan fótbólt vildi verið stórt spell, um eingin fótbóltshøll verður bygd í Eysturoynni. Og tað er so heldur ikki bara fótbólturin, sum kann fáa gleði av slíkari høll, sigur Símun Johannesen.

StÍF-Kyndil II 37-15 (13-7)

## Eingin sensatión hesaferð

**Veteranarnir hjá Kyndli fingu av at vita, tá teir vitjaðu á Skála**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

StÍF hevur meira enn trýkvart bein í steypafinaluni, nú teir hava spælt fyrru hálvfinaluna móti aðru deild hjá Kyndli.

Dysturin mikuvkøldið var sjáldan nakað serliga spennandi. Ikki minst gjørdi StÍF ein vørr tíðliga í seinna hálvleiki, tá teir øktu upp í 27-9. Og hóast Kyndil skapti eina stóra sensatión í fjórðingsfinaluni móti VÍF, so er hetta væl tann munurin, sum eigur at vera millum fremsta føroyska mansliðið og eitt lið, mannað av spælarum, sum vóru á tindunum fyri skjótt fleiri árum síðani.

### FAKTA

**StÍF-Kyndil II 37-15 (13-7)**
10 min: 3-2
20 min: 10-4
40 min: 22-8
50 min: 31-13
**Málskjúttar**
**StÍF:** Sveinur Justinussen 14(2), Leivur Justinussen 6, Bárður Danielsen 5, Bent Djurhuus 4, Danni Syhler 3, David Edvardsen 2, André F. Danielsen 2
**Kyndil II:** Rúni Johansen 6(1), Jónleif Sólsker 4, Dia Midjord 2, Uni Wardum 2(1), Birgir Hansen 1
**Brotskøst:** StÍF 4, Kyndil 4
**Útvísingar:** StÍF 5, Kyndil 5
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen

VB-Stjørnan 22-28(11-16):

## Stjørnan vann í Vági

**Hóast Stjørnan mangan hevur havt tað trupult í Vági, so var ongur slingur í valsinum hjá klaksvíkarkvinnum í hálvfinaluni í steypakappingini í kvøld**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stjørnan fekk flúgvandi byrjan í fyrru hálvfinaluni millum liðini í Vági í gjárkvøldið. Stjørnan legði seg á odda heili 11-2. So kom VB eitt sindur fyri seg, og í hálvleikinum var støðan 16-11 til Stjørnuna.

VB kláraði tó ongantíð at fáa fatur á Stjørnuni aftur, og kvinnurnar úr Klaksvík koyrdu ein tryggan sigur gott útgangstøði til seinnu hálvfinaluna, sum verður spæld í Klaksvík um eina viku.

### FAKTA

**VB-Stjørnan 22-28 (11-16)**
10 min: 2-8
20 min: 7-12
40 min: 16-19
50 min: 16-23
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 10(3), Laila Jespersen 5, Theresa Joensen 2, Monika Samuelsen 2, Una Egilsdóttir 1, Svava Vestergaard 1, Miriam Michelsen 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 10(3), Durita Christophersen 8, Durita Ljósstein 3(1), Bára Skaale Klakstein 2, Una Olsen 1
**Brotskøst:** VB 5, Stjørnan 4
**Útvísingar:** VB 2, Stjørnan 2
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Sámal Paulason.